# Flýggjan - Hvat er tað?

*4.-6. flokkur*

**Tíð**: 2-3 tímar

**Tilfar/Amboð**: Uppgáva 1, Uppgáva 2 og talva

**Námsætlan**: Næmingurin eigur at fata ta ábyrgd, menniskjað hevur av sær sjálvum og medmenniskjum sínum. (Kr) Søga er bæði ein hugvísindalig og ein samfelagsfaklig lærugrein. (Sø) Lærugreinin føroyskt tekur støði í næminginum í síni heild, varðar um vitbornu evnini, eins og tey kensluligu og sosialu. (FØ)

**Frágreiðing**: Sum innleiðsla í evninum: flóttafólk, kann tað verða ein fyrimunur at hugsavna seg um orðið: flýggjan. Næmingarnir kunnu gera hugarok um hvat tað merkir at flýggja. Flýggjan/at flýggja kann hava ymsan týdning:

- at rýma frá einari ódámligari støðu til eina betri ella gagnligari støðu.

- at fara frá heimi ella landi undan kríggi, náttúruvanlukku, atsøkn ella øðrum.

Orðið ”flýggjan” kann tískil nýtast í mongum høpum. Vit kunnu flýggja frá einari keðiligari støðu heima, í ítrottarhøllini ella í skúlanum. Vit kunnu flýggja undan happing og enntá undan veruleikanum. Orðið kann eisini nýtast í breiðari høpi, har leitan eftir grundleggjandi tryggleika er málið.

**Soleiðis gert tú**: Áðrenn næmingarnir fáa uppgávurnar skrivar tú orðið ”flýggjan” á talvuna. Spyr hvat orðið merkir.

Næmingarnir fáa Uppgávu 1. Teir kunnu arbeiða saman tveir og tveir og skriva ella tekna hugsanir, kenslur og annað sum viðkemur evninum á tankakortið.

Skriva at enda uppskotini hjá næmingunum á talvuna. Tosið um orðini og vend prátið inn á tryggleika/ótryggleika, tí fólk sum flýggja eru uttan iva ótrygg.

Skriva tryggleiki høgrumegin hugarokið og ótryggleiki vinstumegin.

Bið næmingarnar blunda í 1 minutt meðan teir hugsa um eina støðu, har teir hava kent seg ótryggar ella tryggar. Kanska onkur hevur verið vilstur, verið úti í ódnarveðri ella um náttartíð, kanska onkur hevur verið bitin av hundi, hoyrt foreldur skeldast o.s.fr.

Gev næmingunum *Uppgávu 2* og gev teimum 10 minuttir at skriva um evnið. Bið næmingarnar stilla seg á rað at lesa tað, teir hava skrivað. Tað ber til at taka hetta í tveimum – fyrst tær positivu søgurnar og so tær negativu.

Spyr: ”Kenna tit tykkum aftur í hasum?” so hvørt ein næmingur er liðugur at lesa. Tey sum kenna støðuna skulu taka eitt fet fram – hini vera standandi. At enda standa næmingarnir allarhelst ymsastaðni og til ber at práta um, hvussu ymisk vit menniskju eru.

Prátið um tær ymisku søgurnar so hvørt tær vera lisnar og fái greiðu á hvat ótryggleikin ella tryggleikin var grundaður í.